DAGSINS MEINING

Viðkomandi ráðstevna

Ráðstevnan hjá Føroyskum Psykiatrirøktarfrøðingum í Norðurlandahúsinum mánadagin 1. september snúi seg um eitt sera viðkomandi og týdningarmikið evni, nevniliga sálarligar trupulleikar hjá børnum og ungum. Ráðstevnan eydnaðist framúr væl og fyrireikararnir eiga stóra tøkk og mikið rós uppiborin frá almenninginum.

Ráðstevnan setti fokus á eitt tabuevni. Psykiskir ella sálarfrøðiligir trupulleikar eru sum heild eitt lítið umrøtt evni í samfelagnum og hetta serstakliga, um talan er um børn og ung. Ráðstevnan vísti, at talan er um ein rættiliga stóran trupulleika í samfelagnum – ein trupulleika, sum vit ikki hava givið nóg stóran ans. Hetta má geva øllum viðkomandi, foreldrum, skúla, heilsuverki, almannaverki, pedagogum og politikkarum nakað at hugsa um. Ráðstevnan avdúkaði eisini, at eitt vaksandi tal av børnum og ungum hava tørv á sálarfrøðiligari hjálp og viðgerð. Hvørjar orsøkirnar eru til hesa støðu er ikki heilt greitt, men sambært serfrøðingarnar eru eitt nú strongd foreldur, karrierures, ótryggleiki heima, hjúnarskilnaður og trótandi álit hjá børnum á tey vaksnu millum orsøkirnar.

Bøtast kann um hesa álvarsomu støðu fyrst og fremst við at tryggja foreldrum betri umstøður. Foreldur mugu sleppa at vera foreldur fyri síni børn. Her eiga vit serstakliga at hava tær einligu møðurnar í huga, og spyrjast má, hvussu politiski viljin er at hjálpa júst hesum,ið hava størsta tørvin á hjálp og stuðli frá samfelagnum. Hetta vil tíðin vísa, men havast má í huga, at vita hava ikki alla verðsins tíð her.

Eisini mugu rammurnar hjá øllum teimum, sum dagliga eru um børnini, munandi betrast. Hetta merkir, at lærarar, pedagogar, sjúkrarøktarfrøðingar, sálarfrøðingar o.o. eiga at fáa nógv betur virkismøguleikar og betri arbeiðsumstøður, eitt nú meira tíð til tað einstaka barnið. Alt hetta setur sera stór krøv til samfelagið og til politisku og búskaparligu raðfestingarnar í samfelagnum. Hvussu útlitini eru fyri øðrvísið og meira barnavinarligum raðfestingum man vera ivasamt. Komandi fíggjarlógin vil vísa, um okkara politikkarar taka hesar spurningar í álvara. Hvussu so verður og ikki, so má staðfestast, at talan var um eina sera týðandi og viðkomandi ráðstevnu, og fara vit her at venda aftur til evnið í næstum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Sandoyggin og Alfred Olsen

Bill Justinussen

Alfred Olsen hevur í bløðunum lesarabræv við heitinum Sandoyggin. Her nemur hann við kommunulæknaviðurskiftini í Sandoynni. Hetta mál hevur fingið nógva umrøðu seinastu árini, tí kommunulæknaviðurskiftini í oynni hava verið vánalig og eru tað framvegis, hóast ein bati nú er at hóma,ið hvussu so er fyri eina tíð.

Familju- og Heilsumálaráðið hevur nýtt nógva orku at loysa hetta mál á ein fyri øll í Sandoynni og Hesti nøktandi hátt, men hetta hevur ikki enn borið á mál. Okkara loysn hevur tikið støði í tí, sum er møguligt. Tá eg sigi møguligt, er tað í ásannan av, at tað tykist fyri tíðina at vera ógjørligt at finna ein og enn minni tveir læknar, sum hava hug at seta seg niður í Sandoynni sum kommunulæknar. Nógv góð hugskot eru nevnd, ikki minst av báðum tingmonnunum og landsstýrismanninum í oynni, og hava vit tikið øll hugskot til okkara og givið teimum ein møguleika. Tó enn til fánýtis.

Tí gjørdist okkara niðurstøða, at besta tænastan fyri borgararnar í Sandoynni er fyrst og fremst ein støðug og varðandi skipan, har í øllum førum ein kommunulækni arbeiðir í oynni allar gerandisdagar í vanligari arbeiðstíð. Hendan skipan tryggjar øllum regluliga atgongd til kommunulækna og ger, at øll kenna læknan og læknin kennir øll; hetta hevur verið eitt av mongum vansum við verandi skipan, tí skiftið av vikarum er stórt. Henda skipan er eftirspurd av fleiri av teimum læknum, sum eru komnir nakað upp í árini og ynskja eitt laðaligari arbeiðslív. Ikki óaktuelt, nú fólk úr Noregi eru og kunna um eldraskipanir á norska arbeiðsmarknaðinum

Tíverri hevur tað enn ikki eydnast okkum at fáa undirtøku fyri eini varandi loysn frá politisku umboðunum í oynni. Tað, sum er møguligt, ynskja tey ikki, og tað, sum tey ynskja, er ikki møguligt. Okkara uppgáva er at tryggja øllum sandoyingum og hestfólkum ta best møguligu tænastu, og tað verður sjálvandi gjørt.

Alfred Olsen sigur, at okkara loysn er ein falskur tryggleiki og at sjálvandi skulu sandoyingar hava lækna 24 tímar um døgnið. Hetta er andstøðutala sum kittlar fólkið í oyruni, men er ikki í trá við sannleikan. Tað er ikki nakar falskur tryggleiki at hava lækna í oynni hvønn gerandisdag, tað er ein veruligur tryggleiki. Hvat sigur Alfred Olsen um allar útoyggjarnar, sum bert hava lækna ein ella tveir dagar um mánaðin. Hava hesi fólk ikki eins stórt krav til kommunulæknatænastu 24 tímar um døgnið sum allir aðrir borgarar í landinum? Gjalda hesi ikki eisini skatt sum øll onnur? Sjálvandi hava hesi somu krøv og sama rætt, men tað vikar ikki tann veruleika, at hetta er ómøguligt.

Vit kunnu altíð nýta trygdina og trygdarkenslu sum grundgeving og so krevja og krevja. Og serliga lætt er hetta, tá ein situr í andstøðu. Men tá samanumkemur hava vit føroyingar eina eftir umstøðunum góða kommunulæknatænastu. Tað er undantakið, at ein ikki fær viðtalu við kommunulæknan sama dag, sum biðið verður um hetta; og tað er hóast alt ikki so galið.

Lat okkum hava í huga, at kommunulæknar ikki eru »katastrofulæknar"«. Um vit hugleiða eina løtu um, hvussu mangir føroyingar til dagligt eru langt burtur frá einum viðtalumøguleika við kommunulækna, sissar hetta okkum kanska nakað. Hugsa um øll, sum búgva á útoyggj. Hugsa um allar føroyingar, sum eru úti á havinum. Hugsa um allar føroyingar, sum í hesum døgum eru í báti eftir náta og sum um nakrar dagar fara at ganga fjøllini. Og tey mongu, sum eru burturi og ferðast. Ískt mong túsund, sum ikki hava atgongd til kommunulækna, hóast ein hjartatilburður ella okkurt annað er eins hugsandi har sum heima við hús.

Góði Alfred! Lat okkum vera realistisk og royna at finna eina skilagóða skipan fyri Sandoynna og Hest. Størstu krøvini til eina slíka loysn er í fyrsta lagi, at hon er støðug, áhaldandi og varandi. Í øðrum lagi eigur hon at vera allar vikutímarnar, men tann loysnin er ikki komin í eyga enn. At krevja av læknum, at teir eru til arbeiðs 24 tímar um døgnið í longri tíðarskeið kann ongin halda til. Í síðsta enda gongur tað eisini útyvir tænastuna, og tað er verri enn nakað.

Um ein samgonga millum sambands- og javnaðarflokkin av sær sjálvum fær kommunulæknar at streyma til Sandoynna loyvi eg mær at ivast í. Men um tit koma framat onkuntíð, verður tað sjálvandi spennandi at fylgja við, um tað fer at eydnast.

Beinta verjir doktararitgerð

Fríggjadagin 12. september fer Beinta í Jákupsstovu at verja doktararitgerð sína um vitan og vald í føroyskum heilsupolitikki við lærda háskúlan í Bergen.

Í ritgerðini, sum hevur heitið »Kunnskap og makt í færøysk helsepolitikk 1820-1970«, viðger Beinta í Jákupsstovu hugtøkini vitan og vald, og í hvønn mun vitan er vald.

1. andmælingur er Jóan Pauli Joensen, dr. phil, professari á Fróðskaparsetri Føroya, og 2. andmælingur er Marit Helgesen, dr. phil, granskari á Norsk Institut for by- og regions-forsk-ning. Haraftúrat hevur Anne Lise Fimreite, dr. polit, sitið í metingarnevndini. Leiðbeinararar hjá Beintu hava verið Audun Offerdal, professari, og Vibeke Erichsen, fyrsti amanuensis.

Beinta í Jákupsstovu tók cand.polit.-prógv við Universitetið í Bergen í 1982, og arbeiðir nú sum lektari á Høgskolen í Molde. Arbeiðið hjá Beintu við ritgerðini er liður í stóru verkætlanini á Fróðskaparsetrinum, "Tradition og modernitet", sum danska granskingarráðið fíggjaði.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjáplass má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Nýtt kirkjuorgul í Fríðrikskirkjuni

Sunnudagin varð nýtt kirkjuorgul vígt í Fríðrikskirkjuni á Nesi á Toftum. Martin Restorff Jacobsen, prestur, er fegin um nýggja orgulið, sum hevur 29 røddir, yvir 2000 pípur og tríggjar tangentrøðir. - Kirkjuráðið hevur arbeitt við hesum síðani 1994, og tískil eru vit glaðir, nú nýtt orgul loksins er komið, sigur prestur

Fakráðgevi Fríðrikskirkjunnar og dómorganisturin í Roskilde, Finn Evald, roynir her nýggja pípuorgulið í Fríðrikskirkjuni. Orgulið er gjørt í Danmark av felagnum P/G Andersen & Bruun, tað hevur 29 røddir, tríggjar tangentrøðir og yvir 2000 pípur. Samlaði kostnaðurin var 4,5 milliónur

Mynd: Maria Olsen

NÝTT ORGUL
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Tá Fríðrikskirkjan varð vígd í 1994, var ætlanin longu tá at fáa nýtt pípuorgul, sum hóskaði inn í myndina, í staðin fyri at keypa brúkt elektroniskt orgul, men ikki fyrrenn níggju ár seinni kunnu prestur, kirkjuráð og avvarðandi annars gleðast um nýtt orgul í Fríðrikskirkjuni.

Kostnaðurin fýra milliónir

Martin Restorff Jacobsen greiðir frá, at orgulið er gjørt í Danmark av partafelagnum P/G Andersen & Bruun, sum fyri hálvum øðrum ári síðani fór undir arbeiðið, tá sáttmáli varð undirskrivaður um verkætlanina.

- Orgulið kostar góðar fýra milliónir, og so kemur MVG afturat. 29 røddir, yvir 2000 pípur og tríggjar tangentrøðir eru, og orgulið er ógvuliga vakurt og fellur væl inn í landslagið í kirkjuni annars, sigur ein vælnøgdur prestur.

Spurdur, um fleiri ikki hava mett, at kostnaðurin á fýra milliónir hevur verið í dýrara lagi, er presturin samdur.

- Jú, hetta er eitt dýrt orgul, og summi hava havt ta áskoðan, at eitt elektroniskt orgul, sum vit higartil hava havt, hevði verið ein betri loysn, men sjálvur haldi eg talan vera um eina góða íløgu.

Prestur leggur afturat, at á einum pípuorgули kann alt jú skiftast út mótvegis einum elektroniskum orguli, og hesi orgul halda tískil sera leingi. Í Danmark finnast pípuorgul, sum vórðu bygd í 1700 talinum, og sum enn rigga sera væl, so nýggja pípuorgulið er ein langtíðarloysn.

Gamalt ynski

Sjálvur hevur Martin Restorff Jacobsen verið prestur í hálvtannað ár í Fríðrikskirkjuni, men hann veit frá kirkjuráðnum, at líka síðani kirkjan varð tikin í nýtslu í 1994, hava ynski og ætlanir verið um nýtt orgul.

- Sáttmáli varð undirskrivaður fyri umleið hálvumøðrum ári síðani, og umframt arkitekt kirkjunnar, Høgna Larsen, hevur fakráðgevi okkara verið danin Finn Evald, sum er dómorganistur í stóru kirkjuni í Roskilde, sigur Martin Restorff Jacobsen.

Sum prestur fegnast hann um, at nýtt og stórsligið orgul nú er at síggja og hoyra í Fríðrikskirkjuni, og sunnudagin var so fyrsti dagurin, tá almenningurin kundi njóta tónarnar úr nýggja orgulinum fylla rúmið, tá vígsla varð hildin.

Tíverri eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á arkitektinum í Fríðrikskirkjuni, Høgna Larsen.

- Endiliga er kirkjan liðug

Niklas Foldbo, formaður í kirkjuráðnum, hevur verið við í arbeiðnum líka síðani 1994, tá Fríðrikskirkjan varð vígd, og heldur hann talan vera um eina skilagóða íløgu í nýggja og flotta orgulið. - Endiliga er kirkjan liðug, sigur Niklas Foldbo glaður

Fríðrikskirkjan á Toftum er sambært formanninum í kirkjuráðnum, Niklas Foldbo, endiliga liðug og fullfíggjað við nýggja pípuorgulinum, sum varð vígt sunnudagin

Mynd: Maria Olsen

NÝTT ORGUL
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

- Tá Fríðrikskirkjan varð vígd í 1994, vóru tíðirnar so vánaligar, at vit ikki høvdu ráð til nýtt pípuorgul, so síðani tá hevur elektroniskt orgul verið nýtt, sigur Niklas Foldbo, formaður í kirkjuráðnum í Toftum.

Ein stór løta

Fyri Niklas Foldbo var tað ein stór løta, tá nýggja orgulið var tikið í nýtslu sunnudagin. Undir vígsluni av nýggja orgulinum vórðu allir stólarnir vendir móti nýggja dýrgripinum, og tað er fyrstu ferð, at allir stólarnir eru vendir við.

- Eg sat við kensluni, at endiliga er kirkja okkara liðug. Vit hava gjørt ymiskt síðani 1994, sum hevur ligið á láni, t.d. kirkjukjallaran, men kirkjan hevur ongantíð verið fullfíggjað, fyrrenn vit fingu nýtt pípuorgul, og tískil var tað ein stór løta, sigur ein ikki sørt kensluborin Niklas Foldbo.

Hann vísir eins og prestur á, at talan við nýggja pípuorgulinum er um eina langtíðarloysn.

- Tað skuldi hildið 100-200 ár, meðan eitt elektroniskt orgul skjótari fer, og tískil haldi eg, at kirkjan hevur gjørt eina góða íløgu, sigur Niklas Foldbo.

Formaðurin í kirkjuráðnum leggur afturat, at teir hava fingið 10 ára garanti frá orgulbyggjarunum úr Danmark, har árligt eftirlit verður við orgulinum, so ymiskt kann finpussast og justerast fyrstu 10 árini.

Umskipað fíggjarviðurskifti

Niklas Foldbo, sum hevur verið við í gongdini frá 1994, vísir víðari á, at nakrar umbroytingar hava verið framdar á fíggjarliga økinum í sambandi við nýggja orgulið.

- Vit hava havt aðrar skuldir á okkum, men tær máttu vit so fáa av vegnum, áðrenn nýggjar íløgur vórðu gjørdar í orgulið, sum kostaði 4,5 milliónir við teimum umbyggingum í kirkjuni, sum kravdust, sigur Niklas Foldbo. Hann undirstrikar, at fíggjarligu raðfestingarnar hava verið umskipaðar nakað orsakað av orgulinum.

Føroya Lívstrygging hevur tryggjað verkætlanina við nýggja pípuorgulinum, sum sunnudagin varð vígt í Fríðrikskirkjuni.

- Nú fáa organistarnir Mikal Johan Heinesen, Max Højgaard og Jónsvein Mikkelsen veruliga eitt dýrt og flott orgul at spæla sær við, sigur Niklas Foldbo flennandi at enda.